# Rutur og røtur í norðuratlantiskari ferðavinnu

**Lýsing av høvuðsevni til Frændafund nr. 10, Tórshavn 16.-18. august 2019**

Granskingarsamstarvið Frændafundur heldur ráðstevnu 16.-18. august 2019 við evninum ferðavinna sum høvuðsevni. Stigtakari er føroyska frændafundarnevndin við Bergur Rønne Moberg sum formanni. Ráðstevnan verður hildin á Fróðskaparsetur Føroya (Sjóvinnuhúsið, Vestara Bryggja, Tórshavn). Henda afturvendandi ráðstevna hevur í nógv ár verið miðdepil fyri granskingarmenning og øðrum samstarvi millum Føroyar og Ísland, og við globaliseringini av okkara región í Norðuratlantshavi og Arktis saman við øktum millumtjóða samstarvi á øllum økjum verður ikki minni brúk tílíkari ráðstevnu í framtíðini. Við MICE-konseptinum í huga eru ráðstevnur haraftrat góðar fyri Havnina og Føroyar sum ein inntøkumøguleiki.

Ferðavinna er vorðin lýst sum ein hjálparhond og sum eitt hóttandi spøkilsi. Nú ferðavinna av álvara er farin at taka seg fram í Norðuratlantshavi og ikki minst í Íslandi og Føroyum verða hesar báðar síður av hesum fyribrigdi javnan umrøddar. Ferðavinna í Føroyum hevur ment seg til onki minni enn ein nýggjan búskap og er longu komin inn í skúlaskipanina sum lærugrein og inn í granskingina og undirvísingina á Fróðskaparsetrinum, sum undirritaði leggur til rættis. Í Íslandi, m.a. á Háskóla Íslands, hevur verið granskað og undirvíst í ferðavinnu í meira enn 10 ár.

Ferðavinna skapar ein nýggjan búskap og hevur nógva kraft í sær til at broyta samfelag og mentan, og mentanarferðavinna er at fata sum eitt svar til hesar broytingar. Mentanarferðavinna kann kallast eitt slag av mentanarligari globalisering og glokalisering og er á tann hátt eisini ein máti menna føroyskt-íslendskan samleika. (Mentanar)ferðavinna rúmar møguleikum fyri einum nýggjum føroyskt-íslendskum brandi/storytelling, har man kann brúka menningina innan nisjuferðavinnur sum filmsvinnu, gastroturismu og annars fremstu listaligu-kreativu avrik landanna til at branda Føroyar og Ísland. Og tað hevur longu verið gjørt í fleiri ár. Londini bæði hava sannkent, at tey hava brúk fyri einari nýggjari placebranding, sum á kosmopolitiskan hátt kann sameina heim og heima, fortíð og nútíð.

Frændafundur nr. 10 hevur av tí sama valt ferðavinnu/Ferðafrøði sum høvuðsevni. Ætlanin við hesum høvuðsevni er at fáa lýst hetta umtakið og fyribrigdið úr íslendskum og føroyskum sjónarhorni í flest møguligum brigdum og við støði í flest møguligum frøðigreinum. Tað fer eisini at bera til at halda fyrilestrar um onnur evni, sum viðvíkja íslendskum og føroyskum felagsviðurskiftum.

Umframt evnislýsingar, framløgum av granskingarúrslitum og knowledge-sharing er úrslitið av og endamálið við ráðstevnuni at geva fyrilestrarar út í bók eins og gjørt hevur verið til undanfarnar Frændafundir. Væntandi verða umleið 40 fyrilestrarhaldarar og munandi fleiri luttakarar. Umframt fyrilestrar verða 2 útferðir gjørdar:

16. august: Williamshús
18. august: til Kirkjubøar

Ferðavinnutemað er yvirhøvur aktuelt evni og haraftrat breitt hugsað sum høvuðsevni fyri komandi ráðstevnuni. Málbólkurin er tískil breiður og almennur, og fyrireikingarnevndirnar í Føroyum og Íslandi vænta stóran áhuga fyri hesari ráðstevnu, sum fer langt út um akademia og gransking. Viðvíkjandi høvuðsevninum á ráðstevnuni verða niðanfyri nevnd nøkur evni úr rúgvuni, sum kunnu hugsast at hava áhuga og sum kunnu verða grundarlag undir komandi verkstovum. Hetta eisini fyri at vísa, hvussu aktuelt, viðkomandi og fevnandi hetta evnið er:

- Læraraútbúgvingar í 100 – 150 ár (ynski er frá føroyskari síðu at hava hesa workshop, men pláss er fyri fleiri luttakarum)
- Ferðavinna – millum mentan og búskap'
- Ferðavinna og møguleikar fyri 'knowledge-transfer' millum ymsar frøðigreinir og sektorar í samfelagnum
- Ferðavinna, tjóðarbrand, býarbrand
- Heritage-tourism, museum og performativar frásøgustrategiir
- 'Intangible' og 'tangible' mentanararvur - ítøkiligar og óítøkiligar virðisketur
- Ferðavinna sum kreativur búskapur
- Ferðavinna og sambandið millum almennar og privatar 'stakeholdarar'
- Ferðavinna og branding/storytelling
- Ferðavinna, minnismentan og samleikaumsiting
- Nisjuferðavinnur: Filmsferðavinna, bókmentaferðavinna, arkitekturisma, 'adventure-tourism', 'deep travel'
- Bókmentaferðavinna sum nýtt sjálvævisøguligt rák innan bókmentafrøði
- Ferðavinna og dálking/vistfrøðiligir spurdómar í 'høga norði'
- Ferðavinna, burðardygd, 'resilience'
- Ferðavinna í Arktisk/Norðuratlantshavið: vernd av náttúruperlum og mentanarperlum
- Ferðavinna, landslag og landafrøði
- Ferðavinna, samskifti og nýtsla av talgildari tøkni
- Ferðavinna, migratión og integratión
- Eygnabrá, forbrúkmynstur ferðafólksins
- Mentanarferðavinna og mentanararvsligar/listaligar sóljurutur
- Travel writing og ferðavinna. Ferðir í bókmentum og list og mentanarferðavinna
- Ferðavinnuforbrúk og mentanarmøtir
- Gastroferðavinna, bókmentaferðavinna, arkitekturisma, filmsferðavinna
- Ferðavinna – náttúruferðavinna og mentanarferðavinna
- Ferðavinna og talgildir plattformar (Tripadvisor, Airbnb, Facebook, Instagram)
- Ferðavinna/mentanarbúskapur og autentisitetur
- Ferðavinna/mentanarbúskapur og oyggjasamfeløg
- Avbjóðingar innan ferðavinnu í Arktis og Norðuratlantshavi
- Háttalagsligar avbjóðingar innan ferðafrøði (Tourism Studies) og ferðavinnurelaterað studiir